# Sethúsatrygd
## tryggingartreytir

TRYGD

nr. 5–02

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit


## 1. Alment

| | | |
|---|---|---|
| 1.1 | Lóggáva | 4 |
| 1.2 | Nývirðistrygging | 4 |
| 1.3 | Hvør er tryggjaður? | 4 |
| 1.4 | Tryggingarstaður | 4 |
| 1.5 | Hvørjar skaðar og lutir fevnir tryggingin um? | 4 |
| 1.6 | Bygningur í gerð og undir umbygging | 4 |
| 1.7 | Fráboðanarskylda | 4 |

## 2. Endurgjald

| | | |
|---|---|---|
| 2.1 | Skaðauppgerð | 5 |
| 2.2 | Hvussu verður endurgjald veitt? | 5 |
| 2.3 | Endurgjald til afturgerð av bygninginum | 5 |
| 2.4 | Avskrivingar fyri ávísar bygningslutir | 5 |
| 2.5 | Endurgjald fyri skaðar á urtagarðar | 6 |
| 2.6 | Byggieftirlit | 6 |
| 2.7 | Fylgiskaði av avfalli | 6 |
| 2.8 | Kosmetiskur skaði | 6 |
| 2.9 | Umvælingin seinkað | 6 |
| 2.10 | Broyting av upphitingarorkuslagi | 6 |
| 2.11 | Tómir bygningar | 6 |
| 2.12 | Bygningar, ið skulu verða tiknir niður | 7 |
| 2.13 | Bygging uttan fyri verandi grund | 7 |
| 2.14 | Bygningar undir endurnýgging/nútíðargerð | 7 |
| 2.15 | Kontant endurgjald | 7 |

## 3. Fylgiútreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| 3.1 | Restvirðistrygging | 7 |
| 3.2 | Øktar byggiútreiðslur | 7 |
| 3.3 | Nýtiligar restir | 8 |
| 3.4 | Bjarging og varðveitsla | 8 |
| 3.5 | Upprudding | 8 |

## 4. Skaðafráboðan v.m.

| | | |
|---|---|---|
| 4.1 | Tá skaði hendir | 8 |
| 4.2 | Skaðafráboðan | 8 |
| 4.3 | Umvæling | 8 |
| 4.4 | Ábyrgdarskaðar | 8 |
| 4.5 | Skjalprógv | 8 |

## 5. Felagsreglur

| | | |
|---|---|---|
| 5.1 | Tá trygging verður teknað | 9 |
| 5.2 | Iðranarrættur | 9 |
| 5.3 | Serligar treytir fyri bygningsbrunatryggingina | 9 |
| 5.4 | Dupulttrygging | 9 |
| 5.5 | Eigaraskifti | 9 |
| 5.6 | Tryggingargjøld | 9 |
| 5.7 | Prístalsviðgerð | 9 |
| 5.8 | Broyting av tryggingartreytum og gjaldsskrá | 9 |
| 5.9 | Váðabroytingar | 10 |
| 5.10 | Sjálvsábyrgd | 10 |
| 5.11 | Sertreytir | 10 |
| 5.12 | Serlig undantøk | 10 |
| 5.13 | Eftirlit við bygningunum | 11 |
| 5.14 | Gildistíð og uppsøgn | 11 |
| 5.15 | Treytir fyri bygningsbrunatrygging, ið ikki kann verða vikið frá | 11 |
| 5.16 | Burturbeining av skaddum lutum | 11 |
| 5.17 | Viðlíkahald o.a. | 11 |
| 5.18 | Skaði elvdur við vilja ella av ósketni | 11 |
| 5.19 | Trygdarásetingar | 11 |
| 5.20 | Leitingarútreiðslur | 11 |
| 5.21 | Kærumøguleikar | 12 |
| 5.22 | Gerðarrættur | 12 |

## 6. Serstakar tryggingar

| | | |
|---|---|---|
| 6.1 | Rættarhjálp | 12 |
| 6.2 | Húseigaraábyrgdartrygging | 13 |
| 6.3 | Mistar leiguinntøkur og endurhýsing | 13 |
| 6.4 | Sálarlig kreppuhjálp | 14 |

## Endurgjaldsskrá 16–19

# Sethúsatrygd

## 1. Alment

### 1.1 Lóggáva

Umframt hesar tryggingartreytir er føroysk lóggáva á økinum og møguligar sertreytir í tryggingarskjalinum galdandi.

### 1.2 Nývirðistrygging

Um einki annað er avtalað, er tann tryggjaði bygningurin tryggjaður til fult virði fyri samsvarandi nýggjan bygning, sí grein **2.1–2.15**.

### 1.3 Hvør er tryggjaður? (tryggjaði)

1.3.1 Tryggjaði er tann, sum hevur rætt til endurgjald. Sí Tryggingaravtalulógina § 2.

1.3.2 Tryggjaði er tann, ið eigur ognina.

1.3.3 Tryggingartakarin er tann, ið hevur teknað tryggingina. Sí Tryggingaravtalulógina § 2.

1.3.4 Tá talan er um húseigaraábyrgdartryggingina, fevnir tryggingin eisini um meðhjálp, ið ansar bygninginum.

### 1.4 Tryggingarstaður

Tryggingin fevnir um ognina á tí tryggingarstaði, sum nevndur er í tryggingarskjalinum (matr. nr., gøtunavn og nummar o.s.fr.).

### 1.5 Hvørjar skaðar og lutir fevnir tryggingin um?

1. Tryggingin fevnir um beinleiðis skaða á tryggjaða bygningin, um talan er um skaðaorsøk, ið tryggingin fevnir um.
   - 1.1 Sí endurgjaldsskránna á síðu **16–19** fyri hvørjir bygningslutir o.l. eru fevndir av hvørjum skaðaorsøkum.
2. Urtagarðar og túnlegging, um tílíkir skaðar stava frá bygningsskaðum, sum geva rætt til endurgjald.
   - 2.1 Í tann mun útreiðslurnar kunnu verða kravdar endurgoldnar av tí almenna, verður einki endurgjald rindað.
3. Urtagarðsøki, um skaðin er fylgja av skaða á grannabygning.
   - 3.1 Endurgjaldsskylda er treytað av, at skaðin á grannabygningin er elvdur av skaðaorsøk, ið er fevnd av hesi trygging.
4. Dálking á urtagarðsøki, sum stendst av leka frá egnum oljutanga, hóast talan ikki er um bygningsskaða, sum tryggingin fevnir um.
   - 4.1 Endurgjaldsskylda er treytað av, at tryggjaði ikki hevur sett til viks alment galdandi fyriskipanir.

### 1.6 Bygningur í gerð og undir umbygging

1.6.1 Tryggingin fevnir um bygning í gerð ella undir umbygging, íroknað tilfar á arbeiðsplássinum, ið skal verða lagt inn í bygningarnar. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi fyri byggitilfar, at byggitilfarið er á tí tryggingarstaði, ið nevnt er í tryggingarskjalinum.

**1.6.2 Tryggingin fevnir ikki um**

1. Stuldur ella herverk móti bygningunum ella byggitilfari.
2. Leysafæ á byggiplássinum, t.d. amboð og maskinur, ið nýtt verða til ný- ella umbyggingina.

1.6.3 Verða sanitetslutir og glas brotið, er endurgjald treytað av, at lutirnir eru endaliga uppsettir á teirra verandi staði í bygningunum.

**1.6.4 Minst til!**

Tá farið verður undir ný- ella umbygging kann eisini verða neyðugt við aðrari trygging (Arbeiðstøkutrygging). Set teg tí altíð í samband við Trygd, áðrenn tú fert undir at byggja, byggja afturat ella byggja um.

1.6.5 Tryggingartakarin hevur skyldu til at boða Trygd frá, tá ný- ella umbyggingin er liðug. Síðani tekur felagið støðu til, um bygningarnir skulu verða sýnaðir fyri at fáa staðfest, um og undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda áfram.

### 1.7 Fráboðanarskylda

Trygd skal hava fráboðan, áðrenn farið verður undir nýbygging ella broytingar í bygningunum ella á ognini, eitt nú

1. umbygging
2. uppíbygging
3. gera svimjihyl
4. eftirbjálving
5. brunavernd
6. broyting av tekju
7. broyting av bygningsnýtslu
8. broyting av bygningskonstruktión
9. broyting av upphitingarorkuslagi, t.d. sólar- og jarðarhita, hitapumpuútbúnaði og vindmyllur
10. størri umvælingar
11. innlegging av nýggjari upphitingarskipan afturat verandi skipan
12. at gera opnan eldstað
13. at gera útbúnað til gagnnýting av varandi orkukeldum

1.7.1 Verður fráboðanarskyldan ikki hildin, kann tað fáa avleiðingar fyri møguligt endurgjald.

## 2. Endurgjald

### 2.1 Skaðauppgerð

Um onnur avtala ikki er gjørd við Trygd, kann endurgjald ikki ásetast, fyrr enn skaðin er sýnaður.

### 2.2 Hvussu0 verður endurgjald veitt?

Endurgjald verður ikki veitt fyri dýrari byggitilfar enn tað, sum var í skadda bygninginum, og í mesta lagi fyri byggitilfar og byggihættir, ið vanligir vóru, tá skaðin hendi.

2.2.1 Tá endurgjald verður ásett, verður fyrilit tikið fyri broytingum í byggiprísum, ið kunnu koma fyri í vanligum byggiskeiði, roknað frá, tá skaðin hendi.

2.2.2 Trygd hevur rætt til:

a) At yvirtaka skaddan lut ímóti at endurgjalda virðið, luturin hevði, beint áðrenn skaðin hendi.

b) At seta skadda lutin aftur í sama stand, hann hevði, beint áðrenn skaðin hendi.

c) At fáa til vega tilsvarandi lut sum tann skadda.

### 2.3 Endurgjald til afturgerð av bygninginum

2.3.1 Endurgjald til afturgerð verður ásett til nývirði.

Við nývirði er at skilja:

Kostnaðurin av at umvæla ella gera aftur tað, ið skatt er, uttan óneyðuga seinkan, á somu grund, eftir sama byggihátti, og til sama endamál. Sí tó grein **2.4**.

2.3.2 Umframt hetta fevnir tryggingin um príshækking í vanligari byggitíð.

2.3.3 Um virðið av tí skadda er minkað meira enn 30% av nývirðinum vegna slit og aldur, verður endurgjaldið ásett sambært tílíkari virðisminking. Tá mett verður um virðisminking, skal t.d. verða havt í huga lutfallið millum ta tíð, luturin hevur verið brúktur og ta tíð, hann kundi verið brúktur. Sí tó grein **2.4**.

2.3.4 Endurgjaldið verður útgoldið sambært rokning, tá umvælingin er liðug.

2.3.5 Verður endurgjaldið ikki nýtt til afturgerð av skaðanum, sum avtalað, kann Trygd krevja tær spardu upphæddirnar afturrindaðar.

2.3.6 Viðvíkjandi kontantum endurgjaldi, sí grein **2.15**.

### 2.4 Avskrivingar fyri ávísar bygningslutir

Fyri niðanfyri nevndu bygningslutir verður endurgjaldið tó niðurskrivað eftir aldrinum á lutinum, tá skaðin hendi. Tað er tann samlaði skaðin á lutin, ið verður avskrivaður – tað vil siga, eisini møguligar útreiðslur til handverkarar o.o. Bygninglutir, ið ikki eru nevndir í grein 2.4, kunnu avskrivast vísandi til bóklingin „Levetidstabeller“ frá forlagnum Forsikring og bóklingin „V&S Prisdata“ frá útgevaranum Byggecentrum.

2.4.1 Útreiðslur til umvælingar verða endurgoldnar eftir somu reglum.

2.4.2 Er tryggingin teknað við sjálvsábyrgd, verður sjálvsábyrgdin drigin frá endurgjaldinum, eftir at avskrivingin er gjørd.

#### 2.4.3 Tekjur av pappi

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–15 | 100 |
| 15–20 | 80 |
| 20–30 | 50 |
| 30+ | 20 |

#### 2.4.4 Tekjur av græsi og øðrum náttúrurunnum tilfari

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–20 | 100 |
| 20–30 | 80 |
| 30–40 | 50 |
| 40 + | 20 |

#### 2.4.5 Tekjur og klædningur av plastikki og pvc

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–8 | 100 |
| 8–15 | 70 |
| 15–20 | 40 |
| 20+ | 20 |

#### 2.4.6 Upphitingarútbúnaður, so sum oljufýringar, heittvatnstangar, ketlar og varmavekslarar (ikki hitapumpur, brenniovnar og peisir)

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–10 | 100 |
| 10–15 | 68 |
| 15–20 | 52 |
| 20–25 | 36 |
| 25+ | 20 |

#### 2.4.7 Hitapumpur

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–3 | 100 |
| 3–10 | 60 |
| 10–15 | 40 |
| 15+ | 20 |

#### 2.4.8 Harðar hvítvørur, keramiskar kókiplátur, glas í ovnum, el-riknir motorar og el-radiatorar

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–3 | 100 |
| 3–10 | 70 |
| 10–15 | 47 |
| 15+ | 20 |

**2.4.9 Aðrir el-lutir (bert í sambandi við el-skaðar)**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–2 | 100 |
| 2–3 | 80 |
| 3–4 | 70 |
| 4–5 | 60 |
| 5–6 | 40 |
| 6–10 | 20 |
| 10+ | 0 |

**2.4.10 Antennur og parabolir við tilhoyri**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–3 | 100 |
| 3–8 | 60 |
| 8–10 | 40 |
| 10+ | 20 |

**2.4.11 Føst gólvteppi, herundir teppi, ið eru límaði fast til eitt undirlag ella løgd á eitt undirlag, sum ikki er at meta sum liðugt gólv**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–5 | 100 |
| 5–8 | 60 |
| 8–10 | 40 |
| 10+ | 20 |

**2.4.12 Gólválegging, so sum træ, vinyl, kork, laminat og annað**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–10 | 100 |
| 10–15 | 70 |
| 15–20 | 60 |
| 20–25 | 40 |
| 25+ | 20 |

**2.4.13 Útbúnaður til at gagnnýta varandi orkukeldur, so sum vindmyllur, sólhita- og jarðhitaskipanir**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–10 | 100 |
| 10–15 | 60 |
| 15–20 | 30 |
| 20+ | 20 |

**2.4.14 Vindeygu, hurðar og framsíður av træi**

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–20 | 100 |
| 20–30 | 60 |
| 30–40 | 40 |
| 40 + | 20 |

**2.4.15 Niðurgrivin uttandura rør, leiðingar og búrennir**

| Aldur (ár): | Avskriving (kr.) |
|---|---|
| 30–50 | 2.500 |
| 50–70 | 5.000 |
| 70 + | 7.500 |

2.4.16 Endurgjaldið verður gjørt upp fyri hvønn lut sær.

### 2.5 Endurgjald fyri skaðar á urtagarðar

2.5.1 Útreiðslur til at endurnýggja urtagarð kunnu í ongum førum verða endurgoldnar við meira enn kr. 210.000 (2015). Endurgjaldið verður prístalsviðgjørt sambært grein **5.7**.

2.5.2 Endurgjald verður veitt fyri at planta av nýggjum við samsvarandi plantum. Fyri runnar og trøð yvir 4 ár, verður endurgjald tó bert veitt fyri upp til 4 ára gamlan vøkstur. Endurgjaldið fellur burtur, verður ikki plantað av nýggjum.

### 2.6 Byggieftirlit

2.6.1 Endurgjald verður veitt fyri rímiligar og skjalprógvaðar útreiðslur til ráðgevandi byggieftirlit í sambandi við totalskaða.

2.6.2 Endurgjaldið kann í mesta lagi verða 5% av tilboðsupphæddini fyri uppafturbygging – upprudding og niðurríving ikki íroknað.

2.6.3 Endurgjaldið er treytað av, at ráðgevingin verður framd av vinnuligum ráðgeva, og at uppafturbygging fer fram.

2.6.4 Tað er somuleiðis ein treyt fyri endurgjaldi, at tryggingartakarin og Trygd eru samd um valið av ráðgeva.

### 2.7 Fylgiskaði av avfalli

2.7.1 Tryggingin fevnir um skaðar av avfalli. Treytin fyri endurgjaldi er, at skaðin hevur beinleiðis samband við og hendir beint aftaná, at bygningurin fær skaða av eini skaðaorsøk, ið bygningstryggingin fevnir um.

### 2.8 Kosmetiskur skaði

2.8.1 Endurgjald verður ikki veitt fyri kosmetiskan skaða, ella at nýggir lutir ikki hava sama lit sum teir upprunaligu skaddu.

### 2.9 Umvælingin seinkað

2.9.1 Tryggingin fevnir ikki um meirkostnað, ið stendst av, at tryggingartakarin er atvoldin til, at umvælingin er seinkað.

### 2.10 Broyting av upphitingarorkuslagi

Tað er ein treyt fyri endurgjaldi at:

1. Øll neyðug loyvi frá almennu myndugleikunum fyriliggja.
2. Øll krøv, ið almennu myndugleikarnir áseta, eru fylgd.
3. Bert umhvørvisvinarlig veska, ið er góðkend av almennu myndugleikunum, er nýtt í skipanini.

### 2.11 Tómir bygningar

2.11.1 Fyri bygningar, ið standa tómir, verður frádráttur gjørdur galdandi fyri virðisminking, sum stendst av sliti og aldri, minkaðum nýtsluvirði og øðrum umstøðum.

**2.12 Bygningar, ið skulu verða tiknir niður**

2.12.1 Fyri bygningar, ið frammanundan einum skaða vóru ætlaðir at taka niður, verður endurgjald veitt fyri upprudding, men ikki útreiðslur til niðurtøku. Umframt hetta verður endurgjald veitt fyri bygningslutir, sum ætlanin var at brúka aftur, til tað virðið teir høvdu beint frammanundan skaðanum (dagsvirði), tvs. frádráttur verður gjørdur vegna aldur og slit.

2.12.2 Endurgjald verður ikki veitt fyri at taka sundur (demontering).

2.12.3 Hevði bygningurin ikki verið tikin niður beinanvegin, verður hóskandi endurgjald veitt fyri sakn. Samlaða endurgjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, ið endurgjaldið hevði verið, varð tað ásett eftir frammanfyri nevndu reglum um skaðauppgerð.

**2.13 Bygging uttan fyri verandi grund**

2.13.1 Um tryggjaði velur at byggja uttan fyri tryggingarstaðin, verða reglurnar um kontant endurgjald, grein **2.15**, nýttar í sambandi við ásetingina av endurgjaldinum.

2.13.2 Øll neyðug loyvi, t.d. byggiloyvi, skulu fyriliggja, áðrenn Trygd kann taka støðu til endurgjaldið.

**2.13.3 Tryggingin fevnir ikki um:**

1. Restvirðisendurgjald (grein **3.1**)
2. Øktar byggiútreiðslur í sambandi við lógarkrøv (grein **3.2**).

**2.14 Bygningar undir endurnýgging/nútíðargerð**

2.14.1 Um skaði verður uppdagaður í sambandi við umvæling ella nýtímansgerð av bygningi ella bygningsluti, verður endurgjald bert veitt fyri tær meirútreiðslur, ið standast av skaðanum, og ikki fyri tær útreiðslur, ið høvdu staðist kortini.

2.14.2 Endurgjaldið verður roknað á henda hátt:

a) Fyri teir skaddu bygningarnar/bygningslutirnar, sum áðrenn skaðan vóru ætlaðir at nýta aftur, verður endurgjaldið veitt til nývirði.

b) Fyri aðrar bygningar/bygningslutir, sum áðrenn skaðan ikki vóru ætlaðir at nýta aftur, verður bert goldið fyri útreiðslur til upprudding, men við frádrátti av spardum útreiðslum til niðurríving.

2.14.3 Endurgjaldið kann í ongum føri vera meira enn handilsvirðið á tí skadda – tvs. tað, ið bygningurin ella bygningsluturin kundi verðið seldur fyri beint áðrenn skaðan.

**2.15 Kontant endurgjald**

2.15.1 Verður endurgjald ikki brúkt til at endurbyggja tað skadda, kann tryggingartakarin velja at fáa kontant endurgjald útgoldið.

2.15.2 Tá kontant endurgjald verður veitt, verður, umframt frádrátt fyri virðisminking, sum stendst av sliti og aldri, eisini drigið frá endurgjaldinum fyri minkað nýtsluvirði og aðrar umstøður.

2.15.3 Harafturat kann endurgjaldið ikki fara upp um handilsvirðið á bygninginum.

2.15.4 Niðanfyri nevndu útreiðslur verða ikki íroknaðar endurgjaldið:

1. Restvirði
2. Øktar byggiútreiðslur í sambandi við lógarkrøv
3. Útreiðslur til byggieftirlit
4. Príshækking í vanligari byggitíð
5. Niðurríving og burturbeining av nýtiligum restum

2.15.5 Endurgjald er treytað av, at øll, ið hava rættindi sambært tinglýstum ognarheimildum og skuldbindingum, geva sítt samtykki.

## 3. Fylgiútreiðslur

**3.1 Restvirðistrygging**

3.1.1 Tá tryggingin tekur við skaða, kann tryggingartakarin, um skaðin á bygningin er størri enn 50% av nývirðinum, í staðin fyri umvæling velja, at brúkiligar leivdir verða rivnar niður, og nýggjur bygningur, samsvarandi tí gamla, verður bygdur.

3.1.2 Tá funnið verður fram til, hvussu stórur prosentpartur av bygninginum er skaddur, verða niðanfyri nevndu útreiðslur ikki tiknar við:

1. Virðið av brúkiligum leivdum
2. Øktar byggiútreiðslur í sambandi við lógarkrøv
3. Útreiðslur til upprudding og niðurríving
4. Fylgi- og meirútreiðslur í sambandi við umvæling av skaðanum
5. Útreiðslur til byggieftirlit

3.1.3 Møguligur frádráttur fyri virðisminking verður gjørdur samsvarandi grein **2.1–2.15**.

3.1.4 Harumframt verða neyðugar útreiðslur fyri at ríva niður og koyra burtur brúkiligar leivdir endurgoldnar.

3.1.5 Endurgjald er treytað av, at brúkiligar leivdir eru tiknar niður, og at endurgjaldið verður brúkt til endurbygging.

3.1.6 Møguligt tilfarsvirði, ið fæst í sambandi við niðurríving, verður drigið frá í restvirðisendurgjaldinum.

3.1.7 Restvirðisendurgjald verður ikki latið fyri bygningar ella bygningslutir, ið frammanundan skaðanum vóru ætlaðir niðurtiknir. Sí í hesum sambandi grein **2.12**.

**3.2 Øktar byggiútreiðslur (lógarkrøv)**

3.2.1 Í sambandi við skaða, ið tryggingin fevnir um, verður eisini veitt endurgjald fyri øktar byggiútreiðslur til umvæling, ið tryggingartakarin noyðist at rinda til tess at lúka krøv frá byggimyndugleikunum sambært byggilóggávuni.

3.2.2 Endurgjaldið svarar til tær útreiðslur, roknaðar eftir prísunum, tá skaðin hendi, ið fara til umvæling ella endurbygging í sama líki, til sama brúk og á nágreiniliga sama staði.

3.2.3 Endurgjaldið kann í mesta lagi vera 10% av nývirðinum á bygninginum.

3.2.4 Endurgjald er treytað av:

1. At útreiðslurnar viðvíkja teimum pørtum av bygninginum, sum endurgjald verður veitt fyri.
2. At ógjørligt hevur verið at fáa undantaksloyvi frá reglunum.
3. At virðisminkingin av bygninginum, orsakað av sliti og aldri, ikki fer upp um 30%, sammet við nývirðið.
4. At bygningurin verður umvældur ella endurbygdur.

**3.2.5 Endurgjald verður ikki veitt fyri:**

1. Útreiðslur voldar av vantandi viðlíkahaldi.
2. Útreiðslur til at lúka krøv, sum myndugleikarnir høvdu sett, ella kundu havt sett, áðrenn skaðin hendi.

### 3.3 Nýtiligar restir

3.3.1 Um krøv, sett av almennu myndugleikunum áðrenn skaðan, forða fyri, at bygningarnir verða bygdir uppaftur, og undantaksloyvi ikki kann fáast, verður eisini goldið fyri nýtiligar restir.

3.3.2 Endurgjald er treytað av, at bygningurin er skaddur minst 50% orsakað av skaðanum, í mun til virðið áðrenn skaðahendingina.

3.3.3 Virði á restum, ið verða nýttar til annað endamál, verða drignar frá í endurgjaldinum.

### 3.4 Bjarging og varðveitsla

3.4.1 Tryggjaði skal, tá ið skaði er hendur ella er um at taka seg upp, eftir førimuni fyribyrgja ella avmarka skaðan.

3.4.2 Trygd letur í hesum sambandi rímiligt endurgjald fyri at seta í verk hetta arbeiðið. Endurgjaldið verður latið út um tryggingarupphæddina.

3.4.3 Tryggingin fevnir somuleiðis um skaða á tryggjaðar lutir í sambandi við forsvarlig bjargingartiltøk at forða bráðhóttandi skaða á fólk ella lutir, ið onnur eiga.

### 3.5 Upprudding

3.5.1 Trygd letur endurgjald fyri rímiligar og neyðugar útreiðslur til upprudding av tryggjaðu lutunum eftir skaðahending, ið tryggingin fevnir um.

3.5.2 Við upprudding skilst burturbeining av bygningsleivdum, ið ikki kunnu verða brúktar sambært skaðauppgerðini, og burturbeining av sløkkivatni og øðrum, ið brúkt er í sambandi við skaðatýning.

3.5.3 Trygd rindar somuleiðis fyri rímiligar útreiðslur til upprudding av bygningsrestum frá tryggjaða bygninginum, ið farnar eru útum økið hjá tryggjaða á økið hjá nærmasta granna.

3.5.4 Endurgjaldið verður latið út um tryggingarupphæddina.

## 4. Skaðafráboðan o.l.

### 4.1 Tá ið skaði hendir

Hendir skaði, hevur trygginartakarin skyldu til, eftir førimuni, at fyribyrgja ella avmarka skaðan, eins og Trygd hevur rætt at seta tiltøk í verk við sama endamáli.

### 4.2 Skaðafráboðan

4.2.1 Hendir skaði, skal Trygd hava fráboðan skjótast gjørligt.

4.2.2 Ringið á telefon 35 81 00 ella farið inn á **www.trygd.fo** og fráboðið skaðan.

**4.2.3 Skaðatænastan**

Hevur tú tørv á bráðfeingishjálp uttanfyri vanliga arbeiðstíð ber til at ringja til Skaðatænastuna á telefon 32 13 12.

4.2.4 Stuldurs- og herverksskaðar skulu harumframt fráboðast løgregluni, og kvittan fyri hesi fráboðan skal sendast Trygd.

### 4.3 Umvæling

4.3.1 Skaði verður umvældur í samráði við Trygd. Tó kann fyribils umvæling verða gjørd sambært avtalu við Trygd, um tað er neyðugt til tess at fyribyrgja álvarsligum fylgjum. Í aðrar mátar er ikki loyvt at ríva niður, burturbeina ella umvæla tryggjaðar lutir, fyrr enn Trygd hevur givið sítt samtykki. Er ikki biðið um samtykki frá Trygd, fellur endurgjaldsskylda felagsins burtur.

### 4.4 Ábyrgdarskaðar

4.4.1 Tá ræður um ábyrgdarskaða, skal fráboðan sendast Trygd beinanvegin, endurgjaldskrav verður sett fram, ella roknast kann við tí. Endurgjaldsskylda og støðd á endurgjaldskravi mugu ikki verða góðkend uttan samtykki felagsins.

### 4.5 Skjalprógv

4.5.1 Tá skaði er hendir, kann Trygd krevja, at tryggingartakarin skjalprógvar ella ger sannlíkt krav sítt móti felagnum.

4.5.2 Tryggingartakarin eigur tí at goyma kvittanir fyri nýggjar og dýrar lutir.

4.5.3 Fyri serliga virðismiklar lutir eiga myndir at verða tiknar, og myndir og kvittanir at verða goymd uttanfyri tryggingarstaðin, t.d. í kundaboks í peningastovni.

4.5.4 Kann tryggingartakarin ikki skjalprógva ella gera sannlíkt krav sítt móti felagnum, kann hetta hava við sær, at onki endurgjald verður latið, ella at Trygd ásetur endurgjaldið sambært meting, ið Trygd ger.

# 5. Felagsreglur

## 5.1 Tá trygging verður teknað

5.1.1 Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at allar upplýsingar í tryggingarskjalinum eru rættar.

5.1.2 Skeivar upplýsingar kunnu hava við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður ella fellur burtur. Sí í hesum sambandi Tryggingaravtalulógina §§ 4–10.

## 5.2 Iðranarrættur

5.2.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

5.2.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um iðranarrættin.

5.2.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

5.2.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingini, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

5.2.4.1 Iðranarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, ið eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaða ella styttri.

## 5.3 Serligar treytir fyri bygningsbrunatryggingina

5.3.1 Trygd kann ikki strika bygningsbrunatryggingina, uttan so at tú skjalprógvar, at bygningsbrunatrygging er teknað í øðrum tryggingarfelagi við afturvirkandi kraft, ella at allir tinglýstir rættindahavarar hava givið loyvi til, at tryggingin verður strikað.

## 5.4 Trygging sambært øðrum tryggingarskjali (dupulttrygging)

5.4.1 Er trygging fyri somu lutir og sama váða teknað í øðrum tryggingarfelagi, skal skaðin fráboðast bæði Trygd og viðkomandi felagi. Samstundis skal Trygd hava fráboðan um dupulttryggingina.

5.4.2 Er fyrivarni tikið í tryggingarskjalinum hjá hinum tryggingarfelagnum um, at tryggingin fellur burtur ella lækkar, um trygging er teknað sambært øðrum tryggingarskjali, er sama fyrivarni galdandi í hesi tryggingini, og tryggingarfeløgini rinda tá, vísandi til Tryggingaravtalulógina §§ 41–44, lutfalsligt endurgjald.

5.4.3 Er skaddi luturin fevndur av ábyrgdartrygd frá sølumanni, tænastuveiting ella líknandi, hevur tryggjaði skyldu at venda sær til ábyrgdarstillara fyri at fáa endurgjald. Trygd veitir bert endurgjald sambært tryggingartreytunum, um tryggjaði ikki fær fullan dekning frá ábyrgdarstillara.

5.4.4 Hevur Trygd veitt endurgjald vísandi til tryggingartreytirnar, gongur Trygd inn í rættindini hjá tryggjaða mótvegis øðrum, ið kunnu ábyrgdast fyri skaðan.

## 5.5 Eigaraskifti

5.5.1 Trygd skal beinanvegin hava fráboðan um eigaraskifti.

5.5.2 Nýggjur eigari er tryggjaður í mesta lagi 4 vikur frá yvirtøkudegi til nýggj trygging er teknað. Verður eigaraskiftið ikki fráboðað innan hesa freist, fellur tryggingin burtur.

5.5.3 Bygningsbrunatryggingin fer bert úr gildi, um reglurnar í **5.14.4** eru hildnar.

## 5.6 Tryggingargjøld

5.6.1 Fyrsta tryggingargjaldið og uppkravsgjald fella til gjaldingar samstundis, sum tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingargjøld og uppkravsgjøld teir gjalddagar, sum ásettir eru í tryggingarskjalinum.

5.6.2 Gjaldskrøv verða send á ta adressu, ið tryggingartakarin hevur tilskilað. Verður flutt, skal nýggi gjaldsstaðurin verða fráboðaður Trygd beinanvegin.

5.6.3 Verður tryggingargjaldið ikki goldið aftaná fyrsta krav, sendir Trygd nýggja skrivliga gjaldsáminning til ta adressu, tryggingartakarin hevur tilskilað, og tryggingartakarin verður skuldskrivaður fyri áminningargjald.

5.6.4 Í áminningarskrivinum verður tilskilað, hvør rættarfylgjan er, verður tryggingargjaldið ikki goldið innan ta í skrivinum ásettu freistina.

5.6.5 Tílík áminning verður ikki send, fyrrenn minst 14 dagar eru farnir síðani fyrsta gjaldskrav. Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, eru felagsins skyldur falnar burtur.

5.6.6 Trygd kann ikki strika brunatrygging fyri bygningar orsakað av vantandi gjaldi, men hevur veðrætt í ognini og kann gera úttøku fyri gjaldið við afturatkomnum rentum og øðrum útreiðslum.

## 5.7 Prístalsviðgerð av tryggingargjaldi, tryggingarupphæddum og sjálvsábyrgd

5.7.1 Omanfyri nevndu upphæddir verða prístalsviðgjørdar sambært brúkaraprístalinum frá Hagstovu Føroya.

5.7.2 Verða eingi nýtilig almenn vísitøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at prístalsviðgera við øðrum grundarlagi.

## 5.8 Tá ið tryggingartreytir og tryggingargjaldskrá verða broytt

5.8.1 Ger Trygd broytingar í tryggingartreytunum ella gjaldsskránni, hevur felagið rætt til at seta hesar broytingar í verk við 30 daga freist til mánaðarlok.

5.8.2 Umframt omanfyri standandi kann Trygd gera sertreytir galdandi fyri einstaka trygging, strika trygging ella partar av henni (til dømis í sambandi við ov høgt skaðaprosent hjá einstakum tryggingartakara).

5.8.3 Vil tryggingartakarin ikki góðkenna hesar broytingar, kann hann krevja tryggingina setta úr gildi. Tryggingartakarin hevur tá skyldu at boða felagnum frá hesum 14 dagar áðrenn gjalddag, og tryggingin er tá at meta uppsøgd frá tí degi at rokna, tá broytingarnar komu í gildi, sí tó grein **5.8.5**.

5.8.4 Verður broytingin gjørd í sambandi við skaða, er grein **5.14.2** galdandi.

5.8.5 Felagsins treytir fyri bygningsbrunatryggingar kunnu tó bert verða broyttar við góðkenning frá Tryggingareftirlitinum

5.8.6 Hevur Tryggingareftirlitið góðkent, at broyttar treytir fyri bygningsbrunatryggingar kunnu vera galdandi fyri rennandi tryggingaravtalur, uttan at galdandi tryggingar verða broyttar í aðrar mátar, kann tryggingin bert verða søgd upp við vanligari uppsagnarfreist.

5.8.7 Prístalsjavning er ikki at meta sum broyting í gjaldsskránni.

5.8.8 Uppsøgn av tryggingaravtaluni er treytað av, at tinglýstir rættindahavarar hava góðkent uppsøgnina.

5.8.9 Verður tryggingargjaldið goldið, eftir at tryggingartakarin hevur fingið fráboðan um broytingina, er hetta at meta sum at tryggingartakarin hevur góðtikið broytingina.

## 5.9 Váðabroytingar

5.9.1 Tryggingin fevnir bara um ný- og uppíbyggingar, um felagið hevur váttað hetta.

5.9.2 Tryggingartakarin hevur skyldu at boða Trygd frá, soleiðis at støða kann verða tikin til um, og undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda fram, tá farið verður undir:

1. umbygging
2. uppíbygging
3. at gera svimjihyl
4. eftirbjálving
5. brunavernd
6. broyting av tekju
7. broyting av bygningsnýtslu
8. broyting av bygningskonstruksjón
9. broyting ella innlegging av upphitingarorkuslagi, t.d. sólar- og jarðarhiti, hitapumpuútbúnaður og vindmyllur
10. innlegging av nýggjari upphitingarskipan afturat verandi skipan
11. størri umvælingar
12. at gera opnan eldstað
13. at gera útbúnað til gagnnýting av varandi orkukeldum

5.9.3 Sama er galdandi, um rýmt verður úr bygninginum, heilt ella partvíst, bygningurin stendur óbrúktur ella verður friðaður.

5.9.4 Tryggingartakarin hevur somuleiðis skyldu til at boða frá, um:

1. Upplýsingarnar í tryggingarskjalinum eru skeivar.
2. Hann flytir bústað.
3. Bygningarnir skulu nýtast til annað endamál enn tilskilað í tryggingarskjalinum.
4. Meira verður innrættað enn tilskilað í tryggingarskjalinum.

5.9.5 Verður fráboðan ikki send Trygd, kann hetta, vísandi til Tryggingaravtalulógina §§ 45 –50, hava við sær, at endurgjaldsskylda felagsins minkar ella fellur burtur.

5.9.6 Høvdu broytingar ført við sær, at felagið ikki hevði yvirtikið váðan, steðgar ábyrgd felagsins í somu løtu, sum váðabroytingin hendi.

5.9.7 Viðvíkjandi bygningsbrunatryggingini, steðgar ábyrgdin tó bert í teimum førum, tá Trygd ikki hevði skyldu at yvirtaka váðan. Mótvegis teimum, ið hava tinglisin rættindi, fellur ábyrgdin tó burtur við 14 daga ávaring.

## 5.10 Sjálvsábyrgd

5.10.1 Tað er tilskilað í tryggingarskjalinum, um tryggingin er teknað við avsláttargevandi sjálvsábyrgd ella ikki.

5.10.2 Um avsláttargevandi sjálvsábyrgd er vald, er henda sjálvsábyrgd galdandi fyri allar skaðaorsøkir og -útreiðslur, ið tryggingin fevnir um.

5.10.3 Serlig sjálvsábyrgd er tó altíð galdandi, tá talan er um um rættarhjálpartryggingina, sí grein **6.1**.

5.10.4 Serstakar sjálvsábyrgdir eru galdandi fyri møguligar tilvalstryggingar. Hesar sjálvsábyrgdir eru útgreinaðar í viðkomandi tryggingartreytum ella á tryggingarskjalinum.

5.10.5 Eru aðrar serligar sjálvsábyrgdir ásettar í tryggingarskjalinum, er hægra sjálvsábyrgdin altíð galdandi.

## 5.11 Sertreytir

5.11.1 Um serligar treytir eru galdandi fyri tryggingina, er hetta tilskilað á tryggingarskjalinum.

## 5.12 Serlig undantøk

5.12.1 Tryggingin svarar ikki fyri skaða ella útreiðslu av skaða, ið beinleiðis ella óbeinleiðis er voldur av ella stendur í sambandi við:

1. Jarðskjálvta ella annað náttúruólag.
2. Kríggj, viðurskifti álík kríggi, uppreistri ella innanlendis ófriði.
3. Kjarnorkugerð, eitt nú kjarnorkukloyving (fissión), kjarnorkusamanbræðing (fusión) og kjarnorkuavfall, sama um tað er í krígs- ella friðartíðum.

5.12.2 Hóast tað, sum er ásett í grein **5.12.1**, verður goldið fyri skaðar, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru elvdir av ella henda í sambandi við kjarnorkugerðir við vanligum ídnaðarligum, læknafrøðiligum ella vísindaligum endamálum, treytað av at galdandi fyriskipanir eru fylgdar, og brúkið ikki hevur havt samband við reaktor- ella akseleratorrakstur.

**5.13 Eftirlit við bygningum**

5.13.1 Trygd hevur til eina og hvørja tíð rætt til at lata bygningar kanna við atliti til at meta um bygningarnar og váðaviðurskiftini.

5.13.2 Vísir eftirlitið, at bygningurin ikki er tryggingarbarur, ella er serliga útsettur fyri ávísum skaðaorsøkum, kann Trygd gera sertreytir galdandi fyri tryggingina, strika tryggingina ella partar av henni, og geva veðhavaranum boð um hetta við 14 daga ávaring.

5.13.3 Um tryggjaði noktar Trygd at gera nevnda eftirlit, hevur felagið rætt til at strika tryggingina og viðvíkjandi brunatryggingini geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**5.14 Gildistíð og uppsøgn**

5.14.1 Tryggingin er framhaldandi og stendur við til tryggingartakarin ella Trygd skrivliga sigur hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

5.14.2 Tá skaði er avgreiddur, hava bæði tryggingartakarin og Trygd rætt at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at skaðin antin er goldin ella avvístur.

5.14.3 Somuleiðis kann felagið til hvørja tíð siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, verður møgulig sjálvábyrgd ikki goldin beinanvegin kravt er. Hesar treytir eru ikki galdandi fyri bygningsbrunatryggingina.

5.14.4 Fyri bygningsbrunatryggingina er umframt galdandi:

Uppsagnargóðkenning er treytað av samtykki frá rættindahavarum sambært øllum ognarheimildum og skuldbindingum, ið eru tinglýstar á ognini, uttan so at ognin verður tryggjað hjá øðrum felagi, ið hevur loyvi at tekna bygningsbrunatryggingar, og uttan at rættindahavararnir verða verri fyri av hesum.

5.14.5 Eru bygningar ikki fullvæl innrættaðir móti eldsvanda, ella verður rýmt úr bygningunum, kann tryggingin verða søgd úr gildi uttan freist. Mótveigs rættindahavarum sambært grein **5.14.4** steðgar ábyrgd felagsins við 14 daga ávaring.

**5.15 Treytir fyri bygningsbrunatrygging, ið ikki kann verða vikið frá**

5.15.1 Trygd kann ikki við rættarvirknaði gera frávik frá galdandi kunngerð um minstukrøv til tryggingarfeløg í sambandi við tekning av bygningsbrunatrygging, ið Tryggingareftirlitið hevur ásett, til vansa fyri tryggingartakaran og/ella rættindahavarum sambært øllum ognarheimildum og byrðum, ið tinglýstar eru á ognini.

**5.16 Burturbeining av skaddum lutum**

5.16.1 Umvæling má ikki verða gjørd, ella skaddir lutir burturbeindir, uttan góðkenning frá Trygd.

5.16.2 Eru lutirnir burturbeindir ella umvæling gjørd, uttan góðkenning frá Trygd, er hetta fyri egna rokning.

**5.17 Viðlíkahald o.t.**

5.17.1 Bygningar skulu viðlíkahaldast við jøvnum millumbilum.

5.17.2 Um ein skaði fyri tað mesta er orsakaður av vantandi viðlikahaldi, kann Trygd nokta at veita endurgjald fyri skaðan.

5.17.3 Sama ger seg galdandi, um skaðin m.a. er orsakaður av skeivleikum viðvíkjandi projektering, konstruktión, uppsetan ella broti á galdandi lógir og reglugerðir.

5.17.4 Metir Trygd, at tryggjaðu lutirnir eru í ov vánaligum standi, ella at galdandi lógir og fyriskipanir ikki eru fylgdar, kann Trygd strika tryggingina ella partar av henni. Viðv. bygningsbrunatryggingini verður víst til grein **5.14.4**.

**5.18 Skaði elvdur við vilja ella av ósketni**

**5.18.1 Grovt ósketni**

Hevur tryggjaði elvt til skaða við vilja ella av grovum ósketni, kann hann, vísandi til Tryggingaravtalulógina §§ 18 –19, eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

**5.18.2 Identifikatión (javnseting)**

Sama er galdandi, um skaðin er elvdur av hjúnarfelaga ella sambúgva, ið livir saman við tryggjaða.

**5.18.3 Vanligt ósketni**

Hevur tryggjaði elvt til skaðan av ósketni, ið ikki kann kallast grovt, kann Trygd, sambært tryggingaravtalulógina § 20, avmarka endurgjaldið við upp til 5%.

**5.18.4 Skaði hendur av at tryggjaði var ávirkaður av rúsandi løgi ella evni**

Vísandi til Tryggingaravtalulógina § 20 kann endurgjaldið eftir umstøðunum verða niðurskrivað ella fella burtur.

**5.19 Trygdarásetingar**

5.19.1 Eru forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum ella –treytunum, sum skulu verða hildin ella lokin, til tess at fyribyrgja ella minka um skaða, og hevur tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tryggjaði bert krav móti Trygd, um og tá prógvað verður, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av, at hesi forboð og/ella krøv ikki vórðu hildin ella lokin. Sí í hesum sambandi Tryggingaravtalulógina § 51.

**5.20 Leitingarútreiðslur**

5.20.1 Tað áliggur tryggingartakaranum at vísa á eina orsøk til skaða og gera sannlíkt, at dekningur er fyri skaðanum.

5.20.2 Uttan serliga avtalu við Trygd, verða leitingarútreiðslur bert endurrindaðar, um Trygd, vísandi til tryggingartreytirnar, hevur endurgjaldsskyldu fyri skaðan.

### 5.21 Kærumøguleikar

5.21.1 Er ósemja millum teg og Trygd um tryggingarviðuskifti, ella ert tú t.d. ónøgdur við avgerð, ið er tikin í sambandi við skaða, kanst tú, eftir at hava roynt semju við viðkomandi deild, venda tær til kæruviðgera okkara. Sí fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo**

5.21.2 Tú hevur eisini møguleika at senda skrivliga kæru til kærunevndina fyri trygging:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2,1
1572 København V

Tlf. +45 33 15 89 00
Fax +45 33 15 89 10

Telefontíð kl. 10.00–13.00 (donsk tíð)

Heimasíða: **www.ankeforsikring.dk**

5.21.3 Serligt oyðublað til kæruna fæst á heimasíðu okkara **www.trygd.fo** ella á **www.ankeforsikring.dk**

5.21.4 Eitt ávíst kærugjald skal gjaldast, tá kært verður. Kærugjaldið sæst á heimasíðuni hjá kærunevndini, **www.ankeforsikring.dk**. Gjaldið verður endurgoldið, um tú fært fult ella lutvíst viðhald í kæruni.

5.21.5 Vinarliga leggið til merkis, at kæran skal skrivast á donskum.

### 5.22 Gerðarrættur

5.22.1 Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu bæði tryggingartakarin og Trygd krevja, at óvildugir metingarmenn avgera, hvussu stórur skaðin er. Tryggingartakarin velur annan og Trygd hin.

5.22.2 Áðrenn farið verður undir metingina, velja metingarmenninir ein ástøðumann at taka avgerð í spurningum, sum metingarmenninir ikki semjast um.

5.22.3 Semjast metingarmenninir ikki um ástøðumannin, velur Sornskrivarin hann.

5.22.4 Metingarmenninir gera skaðan upp í gjøllum samsvari við reglurnar í tryggingarskjalinum og gera skrivliga frágreiðing um uppgerðina av missinum.

5.22.5 Hvør parturin rindar tí metingarmanni, hann hevur valt. Útreiðslur til ástøðumannin verða býttar javnt millum partarnar.

5.22.6 Avgerðin er endalig og bindandi fyri báðar partar. Koma metingarmenninir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað ástøðumaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmenninir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar.

## 6. Serstakar tryggingar

### 6.1 Rættarhjálp

6.1.1 Endamálið við rættarhjálpartryggingini er at veita fíggjarligan stuðul til sakarmálskostnað av ávísum privatum rættartrætumálum, ið kunnu leggjast fyri dómstól ella gerðarrætt, og sum ikki hava samband við útinnandi arbeiði hjá tryggjaða.

6.1.2 Tryggjaði er tryggingartakarin, annaðhvørt hann eigur ella brúkar ognina.

6.1.3 Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur av vanligari ráðgeving, íroknað ráðgeving frá sakførara.

6.1.4 Um tryggjaði fær brúk fyri rættarhjálpartrygging, skal hann venda sær til sakførara, ið vil átaka sær málið. Áðrenn onnur stig verða tikin í málinum, skal sakførarin leggja málið fyri Trygd við umsókn um fulnað.

6.1.5 Kann málið verða viðgjørt hjá góðkendum kærustovni, skal hesin møguleiki verða brúktur, áðrenn umsókn um rættarhjálpsfulnað kann verða viðgjørd av Trygd.

6.1.6 Við rættartrætu er at skilja ein ítøkilig og aktuell ósemja, ið ber við sær rímiligt grundarlag fyri einum borgarligum sakarmáli.

6.1.7 Endurgjald verður veitt upp til kr. 200.000 Sjálvsábyrgdin er 10% av teimum útreiðslum, ið tryggingin svarar fyri, tó minst kr. 2.500.

6.1.8 Um málið verður skotið inn fyri hægri dómstól, verður roknað nýggj sjálvsábyrgd á 10% av teimum útreiðslum, ið tryggingin svarar fyri, tó í minsta lagi kr. 2.500

6.1.9 Niðanfyri eru dømi um, hvat rættarhjálpartryggingin ikki fevnir um:

1. Trætur í sambandi við útinnandi arbeiði hjá tryggjaða. Við hetta er at skilja:
   a. Trætur, ið viðvíkja egnum virki, bæði tá talan er um høvuðsvinnu, hjávinnu ella frítíðarítriv hjá tryggjaða
   b. Trætur í sambandi við ognaravgerðir við tí undir punkt 1. nevndu nevndu viðurskiftum.
   c. Eina og hvørja trætu íkomin í sambandi við yrkið hjá tryggjaða.
2. Trætur í sambandi við skatta- og avgjaldsmál. Aðrar trætur við almennar myndugleikar, tá avgerðin hjá hægsta fyrisitingarliga myndugleika ikki kann leggjast fyri vanligu dómstólarnar.
3. Flestar familjurættarligar trætur.
4. Innkrevjingarsakir móti tryggjaða, tá einki er at ivast í, at kravið er rættvíst.
5. Trætur, ið kunnu verða viðgjørdar í góðkendum kærustovni.

6.1.10 Legg til merkis, at hetta bert er ein partur av rættarhjálpartryggingini. Fullfíggjaðar treytir fáast á heimasíðu okkara **www.trygd.fo**, ella við at ringja á telefon 35 81 00. Vit vegleiða fegin, um tørvur er á tí.

**6.2 Húseigaraábyrgd**

6.2.1 Endamálið við húseigaraábyrgdartryggingini er at gjalda, um tú ert íkomin løgfrøðiliga endurgjaldsábyrgd, og at hjálpa tær, um tú verður møttur við óheimilaðum endurgjaldskravi.

6.2.2 Tryggingin fevnir um løgfrøðiligu endurgjaldsábyrgdina hjá tryggjaða uttan fyri sáttmálaviðurskifti, ið viðvíkja tryggjaðu ognini og røkt av henni.

6.2.3 Eftir vanligari rættarsiðvenju hevur ein løgfrøðiliga endurgjaldsábyrgd, tá ein hevur borið seg skeivt at ella er farin fram við ósketni ella líkasælu. Harafturímóti hevur ein ikki ábyrgd fyri hendiligum óhappum.

6.2.4 Set teg altíð í samband við Trygd, áðrenn tú átekur tær endurgjaldsábyrgd ella játtar endurgjaldsupphædd.

6.2.5 Tryggingin fevnir um skaða, staðfestur í tryggingartíðini, sama nær ábyrgdarelvandi hendingin barst á.

**6.2.6 Tryggingin fevnir ikki um**

**6.2.6.1 Hendilig óhapp**

Ert tú uttan løgfrøðiliga skuld í óhappinum, verður óhappið roknað sum hendiligt. Fyri hesar skaðar hevur ein ikki endurgjaldsábyrgd, og má skaðarakti tískil sjálvur bera missin.

**6.2.6.2 Skaðar elvdir við vilja**

Hesir skaðar verða bert endurgoldnir av ábyrgdartryggingini, um skaðavaldarin er 14 ár ella yngri, ella hann ikki er so mikið framkomin, at hann er førur fyri at fara fram við skili, tí hann er sálarliga óbúgvin.

**6.2.6.3 Skaðar orsakaðir av at tryggjaði hevur verið ávirkaður av rúsevnum, rúsdrekka ella øðrum rúsandi evnum**

**6.2.6.4 Vinnuvirksemi**

Skaðar orsakaðir av vinnuvirksemi í ella á ognini.

**6.2.6.5 Tilsøgn um endurgjald**

Skaðar, tá ábyrgdin bert er grundað á tilsøgn frá tryggjaða um endurgjald, ella tilsøgn um annað tryggingarendurgjald, ella meira víttfevnandi ábyrgd, enn tryggjaði hevði havt sambært vanligum endurgjaldsreglum uttan fyri sáttmála.

**6.2.6.6 Skaðar á egnar lutir o.t.**

Skaðar á lutir, ið tryggjaði ella sambúgvandi húsfólk hansara eiga, lána, leiga, goyma, brúka, flyta, viðgera, hava lagt undir seg ella á annan hátt hava í varðveitslu.

**6.2.6.7 Skaðar í sambandi við arbeiði v.m.**

Skaðar á lutir orsakaðir av út- ella uppgrevstri, niðurríving ella pilotering og lendissjúnkan í sambandi við tílíkt arbeiði, ella orsakaðir av, at tryggjaði hevur brúkt spreingievni.

**6.2.6.8 Umbygging o.t.**

Skaðar á lutir, orsakaðir av nýbygging, umbygging ella tilbygging av tryggjaðu ognini.

**6.2.6.9 Dálking o.t.**

Skaðar av dálking av ella gjøgnum luft, jørð ella vatn. Tó verður svarað fyri tílíkari ábyrgd, um skaðin er hendur av óvart, ótilætlað og av brádligum óhappi og ikki av, at tryggjaði hevur brotið tær til hvørja tíð galdandi almennu forskriftir.

**6.2.6.10 Motorakfør v.m.**

Skaðar orsakaðir av koyring við motorakførum, traktorar íroknaðir. Tryggingin svarar tó fyri ábyrgd í sambandi við nýtslu av motorriknum tólum minni enn 7,5 kw ella 10 hk. Hendir skaðin á øki, har ferðslulógin er galdandi, verður goldið sambært reglunum og upphæddunum í ferðslulógini.

**6.2.6.11 Ognarmiss**

6.2.6.11.1 Tap, ið er íkomið orsakað av at avtala/sáttmáli ikki er hildin.

6.2.6.11.2 Ognarmiss, ið ikki er orsakaður av skaða á persón ella lut, ið tryggingin svarar fyri.

**6.2.6.12 Skaða fevndur av lutatrygging**

Er skaddi luturin fevndur av lutatrygging, t.d. sethúsa-, familju- ella biltrygging, fellur tín ábyrgd burtur, uttan so at skaðin er elvdur við vilja ella grovum ósketni. Tvs. at hevur tú ikki gjørt skaðan við vilja ella grovum ósketni, skal viðkomandi lutatrygging veita endurgjald fyri lutin, og ikki tín ábyrgdartrygging.

**6.2.7 Skaðauppgerð**

6.2.7.1 Húseigaraábyrgdartryggingin rindar fyri hvørja skaðahending við upp til kr. 10.000.000 fyri persónskaða og kr. 5.000.000 fyri skaða á lut.

Viðvíkjandi motorriknum tólum verður víst til **6.2.6.10**, brotið um motorakfør v.m. Upphæddirnar eru mestamark fyri skyldu felagsins fyri hvørja skaðahending, sama um ábyrgdin liggur á fleiri av teim tryggjaðu.

6.2.7.2 Útreiðslur fyri avgerð av endurgjaldsspurningum verða goldnar, sjálvt um upphæddirnar av hesum fara upp um mestamarkið. Omanfyrinevnda skal verða í samráði við Trygd. Sama er galdandi fyri sakarmálskostnað og rentur av endurgjaldsupphæddum, sum tryggingin fevnir um.

**6.3 Mistar leiguinntøkur og endurhýsing**

6.3.1 Kann tryggingarstaðurin ikki nýtast, orsakað av skaða, ið tryggingin fevnir um, verður endurgjald veitt fyri:

1. Skjalprógvaðar mistar leiguinntøkur, vísandi til galdandi lógligan leigusáttmála, fyri í mesta lagi 1 leigumál.
2. Skjalprógvaðar og neyðugar útreiðslur til leigu av øðrum bústaði svarandi til skadda bústaðin.
3. Neyðugar útreiðslur av út-/innflyting og goymslu av innbúgvi tryggingartakarans.

6.3.2 Endurgjald verður veitt, til tryggingarstaðurin kann takast í brúk aftur, tó í mesta lagi í 12 mánaðir eftir, at skaðin hendi. Tryggingarstaðurin verður mettur at kunna verða tikin í brúk seinast 1 mánaða eftir, at skaðin er umvældur.

6.3.3 Verður skaðin ikki umvældur, ella bygningurin endurbygdur í øðrum líki, verður endurgjaldsupphæddin roknað samsvarandi tí (stytsta) tíðarskeiðinum, ið tað vanliga hevði tikið at gjørt bygningin í sama stand, sum hann var í undan skaðanum.

6.3.4 Verður skaðaumvælingin seinkað av tryggingartakarans ávum, verður endurgjald ikki veitt fyri útreiðslur ella leigumiss, ið standast av hesum.

6.3.5 Endurgjald verður bert veitt í tann mun, tapið ella útreiðslurnar ikki kunnu verða kravdar endurgoldnar av aðrari trygging.

### 6.4 Sálarlig kreppuhjálp

6.4.1 Treytað av læknaváttan, veitir tryggingin fíggjarliga hjálp til sálarliga kreppuhjálp, um ein av niðanfyri nevndu støðum hevur útloyst eina bráðfeingis sálarliga kreppu:

1. Eldur ella eksplosjón í tryggjaðu sethúsunum, sum hevur við sær, at neyðugt er fyribils at flyta úr sethúsunum.
2. Aðrir skaðar, fevndir av sethúsatryggingini, sum hava kostað mannalív.
3. Aðrir skaðar, fevndir av sethúsatryggingini, har hóttandi vandi hevur verið fyri mannalívi.

6.4.2 Tryggingin veitir hvørjum tryggjaða endurgjald fyri upp til 10 viðtalur hjá útbúnum sálarfrøðingi eftir skaða, sum er fevndur av tryggingini.

6.4.3 Endurgjald er treytað av, at Trygd hevur móttikið krav um endurgjald í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at skaðin á tryggjaðu sethúsini er hendur.

6.4.4 Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið tryggjaði ikki kann fáa endurrindaðar aðrastaðni.

## Endurgjaldsskrá

Endurgjaldsskrá

Tryggingin tekur við
Tryggingin tekur ikki við

| | Brunatrygging | | | | Bygningstrygging | | | | | Fjald rør-/kaðal-trygging |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **1 Brunaskaða** | **2 Skaða, tá ið toran slær niður** | **3 Skaða sum stendst av:** | **4 Ravmagnsskaða** | **5 Vatnskaða** | **6 Skaða, sum stendst av frostspreingingi í rørútbúnaði í upphitaðum bygningum/hølum** | **7 Stormskaða** | **8 Bráðkomnum skaða og stuldurs/herverksskaða** | **9 Omanlop, áarlop, skalva- og skriðulop, kavatrýst og ákoyring** | **10 Rør- og /kaðaltrygging** |
| **A**<br>TRYGGINGIN TEKUR VIÐ | Tryggingin tekur við skaða av eldi. Við eld er at skilja opin, logandi, ótamdur eldur. Sí Tryggingaravtalulógina §§ 79–82.<br>**Fylgiútreiðslur**<br>Umframt hetta fevnir tryggingin um rímiligar fylgiútreiðslur av brunaskaða, t.d. sløkkivatni, royki og sóti, og at lutir verða fyri skaða ella blíva burtur í sambandi við brunaskaða. | Toran hevur sligið niður, tá tað ber til at ávísa skaða á bygningslut á tryggingarstaðnum, ið er beinleiðis fylgja av ravmagns- hita- ella orkuávirkan í sambandi við, at snarljósstreymur er leiddur í jørð. | **Spreinging/eksplosjón**<br>– evnafrøðigerð, ið varir stutt og ger sterkan hita og at evni í andgerð økjast ógvusliga í rúmd.<br>**Spreinging av dampketlum og trýstkókarum**<br>Við spreinging er at skilja: Ein brádlig og óætlað útjavning av ymiskum trýsti og uttanfyri eitt ílat.<br>**Niðurdotnum flogfari**<br>og/ella lutum, ið detta niður frá flogfari.<br>**Tilsóting**<br>Brádligari tilsóting frá eldstaði til hølisupphitan, t.d. oljufýrum.<br>**Turrkóking**<br>Turrkóking av ketlum, sum nýttir verða til upphiting. | Ravmagnsskaði er skaði elvdur av skamlopi, induktión, yvirspenningi ella tílíkum. | Vatn, olja og køliløgur, ið brádliga og óvæntað floymir úr rørútbúnaði og vanligum føstum innleggingum, fiskabúrum og øðrum íløtum, ið rúma 20 litrar ella meira.<br>Er talan um útstreyming, veitir Trygd endurgjald fyri útreiðslur til leiting eftir leka og útreiðslur til afturgerð, um avtala er gjørd við Trygd um hetta frammanundan.<br>**Glopraregn og toybil**<br>Tá glopraregn er, ella tá av mesta toybili er, og vatnið ikki rennur frá á vanligan hátt og tí floymir yvir tryggingarstaðið frá tekju, jørðildi ella altani.<br>Við glopraregn er at skilja, at mongdin av avfalli í einum stuttum æli er so stór, at vatnið ikki kann renna frá á vanligan hátt gjøgnum vanliga viðlíkahildin og rætt dimensioneraði frárenningarrør, rennustokkar o.a.<br>Við toybil er at skilja, at lufthitin hækkar fra minus hitastigum til 8–10 plushitastig innan fyri 12 tímar. | Rørútbúnaður, ið førir vatn til bygningarnar út til høvuðsleiðing í vegnum, uttan so at tryggingartakarin kann krevja, at almennu ella kommunalu myndugleikarnir endurrinda útreiðslurnar.<br>Rørútbúnaður, ið er partur av innanhýsis vatn-, sanitets- og frárensluútbúnaðinum í bygninginum, tó ikki takrennur og rennustokkar.<br>Miðstøðuhiti- og heittvatnsútbúnaður við hartil hoyrandi ketlum, vatngoymslum, pumpum, málarum og miðstøðuhitaovnum.<br>W.C. kummur og sisternur<br>Tað áliggur tryggingartakaranum at syrgja fyri, at nóg mikið av olju altíð er í tanganum og at syrgja fyri neyðugari upphiting, fyri harvið at fyribyrgja skaða.<br>Viðvíkjandi bygningum, har fólk ikki eru fastbúgvandi, verður tað somuleiðis álagt tryggingartakaranum at syrgja fyri neyðugari upphiting, ella at steingja fyri vatninum og tøma rørútbúnaðin fyri vatn, fyri soleiðis at fyribyrgja skaða. | Við storm er at skilja vindur, har vindmegin áhaldandi ella í hvirlum er í minsta lagi 17,2 metrar um sekundið.<br>Tryggingin fevnir um brádligar skaðar av stormi og meldurødn og skaðar av avfalli, ið eru beinleiðis fylgja av stormskaða á bygningin.<br>Tryggingin fevnir bert um skaðar av avfalli, um skaðin hevur beinleiðis samband við og hendir beint aftaná, at bygningurin , ella yvirbreiðingartilfar, ið er rætt fest, fær stormskaða.<br>Tað er ein treyt, at tað uttaná bygninginum, ella yvirbreiðingartilfarinum, kann ávísast skaði, sum er hendur av stormi, og at skaðin á tryggjaðu lutirnar kann prógvast at stava frá hesum.<br>Viðvíkjandi endurgjaldi fyri stormskaðar á antennur, sí grein **2.4.10**. | **Bráðkomin skaði**<br>Bráðkomin skaði, ið ikki kemur undir aðrar skaðaatvoldir ella undantøk, nevnd í hesum treytum.<br>Bráðkomin skaði er skaði, har atvold og avleiðing eru uttanifrá og brádliga ikomin. Atvold og avleiðing skulu verða hend samstundis.<br>Skaði, ið hendir yvir eitt tíðarskeið og ikki í ávísari løtu, er ikki bráðkomin skaði. T.d. skaði voldur av:<br>• dryppi og seyri,<br>• frostrivum,<br>• at bygningar sjúnka,<br>• ferðsluristingum,<br>• teringi, tilfarsmøði,<br>• skeivari konstruksjón, skeivum byggihátti og skeivum tilfari,<br>• vantandi viðlíkahaldi, sliti, teringi og rusti,<br>• ónáðum av djórum, ið gnaga ella reiðrast, og<br>• líknandi skaðum.<br>Skaði á tað tryggjaða, ið stendst av vanligum brúki og tískil kann roknast við, verður heldur ikki endurgoldin. T.d. skaði voldur av:<br>• reingerð og umvæling<br>• skeinum, skursli, dálking, sprutti, matarruski, løgi og tílíkum.<br>• dryppi frá máling, málingapenslum og líknandi.<br>**Herverk**<br>Herverk er skaði voldur við vilja og av illum huga av fólki, ið ikki hava lógliga atgongd til hølini.<br>Stuldurs- og herverksskaðar skulu verða fráboðaðir løgregluni, og kvittan fyri fráboðanina send Trygd, áðrenn endalig støða verður tikin til skaðan. | **Omanlop**<br>Grót, ið rapar oman úr homrum, líðum og brekkum<br>**Áarlop**<br>Tá áir leypa, annaðhvørt orsakað av toybili ella at nógv avfall er, og vatn, runa og eyrur rakar ta tryggjaðu ognina.<br>**Skalva- og skriðulop**<br>Tryggingin fevnir um skalva- og skriðulop.<br>**Kavatrýst**<br>Tryggingin fevnir um skaðar av kavatrýsti.<br>**Ákoyring**<br>Tryggingin fevnir um skaða av, at koyrt verður á bygningarnar. | Lekaumvælingum í tryggjaðum fjaldum rør/kaðal/veitingarleiðingum.<br>Skaða á tryggjaðar lutir og urtagarðar, ið er beinleiðis fylgja av leka ella skaða frá rørum, kaðalum ella veitingarleiðingum, ið tryggingin fevnir um.<br>Útreiðslum av at leita eftir lekum í tryggjaðum fjaldum rørum, kaðalum ella veitingarleiðingum eftir avtalu, ið frammanundan er gjørd við Trygd.<br>Tað verður gjørt vart við at uttan serliga avtalu við Trygd, verða leitingarútreiðslur bert endurrindaðar, um Trygd, vísandi til tryggingartreytirnar, hevur endurgjaldsskyldu fyri skaðan.<br>Í sambandi við skaða, ið endurgjald verður veitt fyri, verða útreiðslur til at grava upp, upprudding og afturbøting av fylgiskaðum á bygning og urtagarðsstykki endurgoldnar, um avtala er gjørd við Trygd um hetta frammanundan.<br>Punkt 2.3.3 í tryggingartreytunum um avskriving, sum stendst av virðisminking, er ikki galdandi fyri rør/kaðaltryggingina. |
| **B**<br>TRYGGINGIN TEKUR IKKI VIÐ | • Skaða, sum ikki er fylgja av eldi – eitt nú skaða, ið stendst av svíðing, smelting, koling, yvirhiting ella glóðum frá tubbaksroyking, eldstaði o.l., stikkloga frá el-innleggingum o.s.fr.<br>• Skaða á lutir, ið við vilja verða útsettir fyri eldi ella hita, hóast eldur kemur í teir. | | • Skaða, sum stendst av spreingievni, flutt í flogførum.<br>• Tilsóting, um tilsótingin er orsakað av, at útbúnaðurin ikki lýkur øll fyriskrivað krøv.<br>• Skaða av leypisóti.<br>• Turrkóking av ketli, ið verður nýttur til annað enn hølisupphiting. | • Skaða, sum stendst av konstruksjónsbreki, skeivari uppseting ella mekaniskari oyðilegging.<br>• Skaða, ið er voldur av tørvandi viðlíkahaldi, sliti, overving, teringi ella skeivum brúki.<br>• Skaða, ið kemur undir garanti.<br>• Skaða, ið hendir undir umvæling.<br>• Skaða, ið er orsakaður av, at lóggávan á økinum ikki er fylgd. | **Skaða, sum stendst av:**<br>• Dryppi og seyri<br>• At grund- ella kloakvatn setur upp.<br>• Vatni úr takrennum ella rennustokkum, ella avfalli, ið setur inn gjøgnum tekju ella vegg.<br>• Skaða, ið stendst av ov trongum frárenningarrørum.<br>• Vatnflóð av sjógvi, úr fjøru,veitum, tjørnum og vøtnum ella áum.<br>• Frostspreinging í hølum, ið ikki eru nóg væl upphitað, uttan so at frostspreingingin stendst av hita veiting, ið av tilvild hevur svikið. Hetta er ikki galdandi í hølum, sum tryggingartakarin leigar út, um leigarin hevur skylduna av, at upphitingin svíkur.<br>• Skaða sum hendir undir áfylling ella tøming av oljutanga, køli- og frystiútbúnaði og fiskabúrum.<br>• Innleggingararbeiði, ið er gjørt á fakligan skeivan hátt.<br>• Skeivari konstruksjón ella breki á tryggjaðu bygningarnar ella lutirnar.<br>• Tørvandi viðlíkahaldi, sliti, teringi og rusti. | • Frostspreinging í bygningum ella hølum, ið ikki eru upphitaði, ella í hølum, ið ikki eru nóg væl upphitaði, uttan so at frostspreingingin stendst av tørvandi hitaveiting, ið av tilvild hevur svikið. Hetta er ikki galdandi í hølum, sum tryggingartakarin leigar út, um leigarin hevur skylduna av, at upphitingin svíkur.<br>• Skeivari konstruksjón ella breki á tryggjaðu bygningarnar ella lutirnar.<br>• Tørvandi viðlíkahaldi, sliti, teringi og rusti.<br>• Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur til tiðning.<br>Tað verður gjørt vart við, at tað ikki verður mett sum tilvildarligur svíkur í hitaveitingini, at oljutangin er brendur tómur. | **Skaða, sum stendst av:**<br>• Vatnflóð av sjógvi, úr fjøru,veitum, tjørnum og vøtnum ella áum.<br>• Avfalli ella távatni, ið setur gjøgnum lekar og op, og sum ikki eru beinleiðis fylgja av einum brádliga ákomnum stormskaða á bygningin.<br>• Skeivari konstruksjón ella breki á tryggjaðu bygningarnar ella lutirnar.<br>• Tørvandi viðlíkhaldi, sliti, teringi og rusti. | • Avfalli, ið setur gjøgnum lekar og op, ið ikki er beinleiðis fylgja av bráðkomnum skaða á bygningin,<br>• Vatnflóð av sjógvi, úr fjøru,veitum, tjørnum og vøtnum ella áum.<br>• Herverki, ið húsfólk og starvsfólk gera, ella fólk, ið heilt ella partvís hevur tryggingarstaðin í leigu, til láns ella brúks.<br>• Herverksskaða á bygning í gerð ella byggitilfar.<br>• Stuldur av byggitilfari, um hetta ikki var í avlæstum bygningi ella rúmi.<br>• Skeivari konstruksjón ella breki á tryggjaðu bygningarnar ella lutirnar<br>• Tørvandi viðlíkhaldi, sliti, teringi og rusti. | • Avfalli, ið setur gjøgnum lekar og op, ið ikki er beinleiðis fylgja av dekkandi skaðaorsøk á bygningin.<br>• Vatnflóð av sjógvi, úr fjøru,veitum, tjørnum og vøtnum ella áum.<br>• Skeivari konstruktión ella breki á tryggjaðu bygningarnar ella lutirnar.<br>• Tørvandi viðlíkhaldi, sliti, teringi og rusti.<br>• Skaða, ið stendst av ov trongum frárenningarrørum. | • Umvæling og útreiðslum av lekum, sum var íkomnir, áðrenn tryggingin varð teknað.<br>• Skaða á heittvatnstangar og rør í slíkum. |

TRYGD

**Tryggingin tekur við**

**Tryggingin tekur ikki við**

**Tøl frá nr. 1-10 vísa til skaðaorsøkirnar á blaðsíðu 16–17**

| | Brunatrygging | | | | Bygningstrygging | | | | | Fjald rør-/ kaðaltrygging |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 |
| **C.** Sethús fyri eina ella tvær familjur, sum fyri tað mesta verða brúkt til privatan bústað (min. 50%), íroknað grund niður til 1 metur undir jørð ella kjallaragólv.<br>Bilhús, bilskýli, úthús, vakstrarhús o.t, um tey eru nevnd í tryggingarskjalinum.<br>Stik (ikki livandi), girðingar og rimagarður, ið eru sett oman á laðað ella stoypt støði. | Tað er ein treyt, at alt er forsvarliga fest til múrað, lagað ella stoypt støði. | | | | Tað er ein treyt, at alt er forsvarliga fest til múrað, lagað ella stoypt støði. | | | | | **Tryggjaðir lutir:**<br>Fjald gass-, olju-, vatn- og frárenslurør og fjaldir el-kaðalar, ið liggja í teimum bygningum á ognini, ið eru bygdir á múraða ella stoypta grund, og sum sethúsatryggingin fevnir um.<br>**Fjald rør eru:**<br>▪ Rør, ið eru stoypt ella fjald í veggum, múrum ella gólvum.<br>▪ Rør, ið liggja fjald undir gólvum í rørkassum ella krúpikjallarum.<br>▪ Rør, ið eru fjald í væðingum.<br>Niðurgrivnar leiðingar uttandura til vatn, hita, el- og frárenslinnleggingar, úr innføring í tryggjaðu bygningunum til høvuðsleiðing í vegi, uttan so at tryggingartakarin kann krevja, at almennu ella kommunalu myndugleikarnir endurrinda útreiðslurnar. Niðurgrivin rør frá oljutanga/øðrum orkukeldum til bygning.<br>Um so er, at bygningurin ikki hevur samband við felagskloak, tá frá bygningi til egnan rottanga ella til egið reinsiverk.<br>Dentur verður lagdur á, at rør og slangur í heittvatnstangum, í vaski-, uppvaski- og turkimaskinum, umframt frysti- og kuldaskápum ikki eru fjald rør.<br>Hetta er tó ikki galdandi fyri slangur í uppvaskimaskinum, ið eru innbygdar í køk. |
| **D.** El-innleggingar, íroknað stikkleiðingar og høvuðstalvur, orku- og ljósinnleggingar, íroknað tilhoyrandi útbúnað, el-húsarhaldstól, so sum køliskáp, frystiboks, komfýr, vaski-, turki- og uppvaskimaskinur. | Tó ikki ljósrør, perur, ljóslýsingar og ljósskelti. | | | | Tó ikki ljósrør, perur, ljóslýsingar og ljósskelti. | | | | | |
| **E.** Fast bygningstilhoyr, fastir bygningspartar og fastar innleggingar av vanligum, ikki vinnuligum, slagi.<br>Føst útgerð at tryggja bygningin móti eldi. | | | | | | | | | | |
| **F.** Glas ella tilfar, ið nýtt verður í staðin fyri glas, og sum er uppsett sum bygningspartur, tó ikki glas í vinnuligum hølum.<br>Við glas er at skilja glas, spegl ella líknandi tilfar í vindeygum, hurðum, brúsuklivum, innbygdum skápum, kókiplátum, ovnum, innmúraðum speglum o.l. | Tryggingin fevnir bert um tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki eru uppsettir, har teir eiga at vera sum byggilutir í bygninginum.<br>Tryggingin tekur við skaða á tryggjaðu lutirnar, tá teir eru óbrúkiligir orsakað av broti, skøvum og avdotnum spónum og flísum.<br>Tryggingin veitir somuleiðis endurgjald fyri skaðar av avfalli, ið eru beinleiðis fylgja av glasskaða, ið endurgjald verður veitt fyri.<br>**Tryggingin fevnir ikki um:**<br>▪ Punkteraðar rútar, óansæð orsøk.<br>Tryggingin fevnir um útreiðslur av at skifta skaddu lutirnar út við samsvarandi nýggjar. Um sama slag av glasi ikki fæst longur, verður kontant endurgjald latið, ið svarar til prísin á lutum, ið vanliga vórðu brúktir, tá ið skaðin hendi. Umvælingarkostnaðurin kann ongantíð verða hægri enn kostnaðurin av at skifta skaddu lutirnar. | | | | Tryggingin fevnir bert um tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki eru uppsettir har, teir eiga at vera sum byggilutir í bygninginum.<br>Tryggingin tekur við skaða á tryggjaðu lutirnar, tá teir eru óbrúkiligir orsakað av broti, skøvum og avdotnum spónum og flísum.<br>Tryggingin veitir somuleiðis endurgjald fyri skaðar av avfalli, ið eru beinleiðis fylgja av glasskaða, ið endurgjald verður veitt fyri.<br>**Tryggingin fevnir ikki um:**<br>▪ Punkteraðar rútar, óansæð orsøk.<br>▪ Tryggingin fevnir um útreiðslur av at skifta skaddu lutirnar út við samsvarandi nýggjar. Um sama slag av glasi ikki fæst longur, verður kontant endurgjald latið, ið svarar til prísin á lutum, ið vanliga vórðu brúktir, tá ið skaðin hendi.<br>Umvælingarkostnaðurin kann ongantíð verða hægri enn kostnaðurin av at skifta skaddu lutirnar. | | | | | |
| **G.** Sanitet<br>Hondvask, køksvask, baðikar, neðrabað, wc kumma, sisterna o.l. | Tryggingin fevnir bert um tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki er uppsettir har, teir eiga at vera sum byggilutir í bygninginum.<br>Tryggingin tekur við skaða á tryggjaðu lutirnar, tá teir eru óbrúkiligir orsakað av broti, skøvum og avdotnum spónum og flísum.<br>**Tryggingin fevnir ikki um:**<br>▪ Brot, skøvur, sár eftir avdotnum spónum og flísum, sum ikki gera lutirnar óbrúkiligar.<br>▪ Kosmetiskan ójavna – tvs. at nýggju lutirnir hava aðra útsjónd ella annan lit enn teir skaddu.<br>Tryggingin fevnir um útreiðslur av at skifta skaddu lutirnar út við samsvarandi nýggjar. Kunnu kranar, blandingsbattarí, vesisetur o.l. ikki nýtast saman við skifta sanitetinum, fevnir tryggingin eisini um hesar lutir.<br>Um tað ikki er gjørligt at fáa til vega sama slag av lutum, sum teir skaddu, verður kontant endurgjald latið samsvarandi prísinum á saniteti, ið vanliga varð brúkt, tá ið skaðin hendi.<br>Umvælingarkostnaður kann ongantíð verða hægri enn kostnaðurin av at skifta skaddu lutirnar. | | | | Tryggingin fevnir bert um tryggjaðu lutirnar, tá teir í heilum líki er uppsettir har, teir eiga at vera sum byggilutir í bygninginum.<br>Tryggingin tekur við skaða á tryggjaðu lutirnar, tá teir eru óbrúkiligir orsakað av broti, skøvum og avdotnum spónum og flísum.<br>**Tryggingin fevnir ikki um:**<br>▪ Brot, skøvur, sár eftir avdotnum spónum og flísum, sum ikki gera lutirnar óbrúkiligar.<br>▪ Kosmetiskan ójavna – tvs. at nýggju lutirnir hava aðra útsjónd ella annan lit enn teir skaddu.<br>Tryggingin fevnir um útreiðslur av at skifta skaddu lutirnar út við samsvarandi nýggjar. Kunnu kranar, blandingsbattarí, vesisetur o.l. ikki nýtast saman við skifta sanitetinum, fevnir tryggingin eisini um hesar lutir.<br>Um tað ikki er gjørligt at fáa til vega sama slag av lutum, sum teir skaddu, verður kontant endurgjald latið samsvarandi prísinum á saniteti, ið vanliga varð brúkt, tá ið skaðin hendi.<br>Umvælingarkostnaðurin kann ongantíð verða hægri enn kostnaðurin av at skifta skaddu lutirnar. | | | | | |
| **H.** Gólváleggingar, teppi íroknað, ið annaðhvørt eru límaðar fastar á undirlag ella lagdar á undirlag, ið ikki kann verða mett sum liðugt gólv. | | | | | | | | | | |
| **I.** Flaggstengur og antennur, sum ikki eru til vinnuligt brúk, grundvatnspumpur og svimjihyljar, ið eru sertilgjørdir at grava niður, breiðsla ikki íroknað.<br>Sólar- og hitapumpuútbúnaður. | | | | | | | | | | |
| **J.** Veggjamálningar, framskornar myndir, uttandura húsaprýði, men bert hvat handverksvirðinum viðvíkur, urtagarðsmyndir, ið eru festar í stætt ella støði, endurgjald tilsamans kr. 70.000 (í 2015) indeksjavnað, umframt ruskíløt. | | | | | | | Tað er ein treyt fyri endurgjaldi fyri ruskíløt, at tey eru forsvarliga vard móti stormi. | | | |
| **K.** Stik (ikki livandi), rimagarðar og timburgirðingar, ið ikki eru sett oman á laðað ella stoypt støði. | | | | | | | | | | |
| **L.** Sóltjøld, hátjøld, sólverjur og skelti. | | | | | | | Tað er ein treyt fyri endurgjaldi á sól- og hátjøld, at hesi eru afturlatin, tá skaðin hendir. | | | |
| **M.** Útbúnaður til at gagnnýta varandi orkukeldur, t.d. jarðhitaútbúnaður og vindmyllur.<br>Uttandura hitapottar og líknandi. | Verður bert tryggjað eftir serstakari avtalu! | | | | Verður bert tryggjað eftir serstakari avtalu! | | | | | |
| **N.** Bygningur í gerð | | | | | | | | Tryggingin fevnir ikki um:<br>1. Stuldur ella herverk móti bygningunum ella byggitilfari.<br>2. Leysafæ á byggiplássinum, t.d. amboð og maskinur, ið nýtt verða til ný- ella umbyggingina.<br>3. Stuldur av byggitilfari, um hetta ikki var í avlæstum bygningi ella rúmi. | | Frostspreinging av fjaldum rørum verður ikki endurgoldin. |

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg